


# Tveir oljurisar leggja saman

**Jógvan Hugo Gardar**

30.03.2015 - 11:40

Oljan.fo

Tvær av heimsins størstu oljutænastuveitarum, amerikansku Halliburton og Baker Hughes, leggja saman. Samanleggingin skal gera at fyritøkurnar sparapengar, samstundis sum tær gerast betri førar fyri at kappast móti tí størstu fyritøkuni á økinum, Schlumberger.

Samanleggingin bleiv almannakunngjørd longu í november, men tað er ikki fyrrenn nú at tey sum eiga partabrøvini hava sagt ja til eina samanlegging.

- Vit hava bíða eftir hesum, sigur Atle Bertelsen, ið er høvuðsálitismaður í norska fakfelagnum Industri Energi. Hann sigur at nógv sum arbeiða hjá hesum báðum fyritøkunum óttast fyri sínum arbeiðsplássum. Hann leggur afturat, at hóast nógv óttast at arbeiðspláss hvørva, so stuðlar fakfelagið samanleggingi, tí man roknar við at samanleggingin ger tað lættari at klára seg í einum oljumarknaði sum er í tungari aldu.

Stavanger Aftenblad skrivar at samanleggingin ber við sær at tað er Halliburton sum leggur Baker Hughes undir seg, og samanleggingin hevur eitt virði uppá 34,6 milliardir dollarar, svarandi til einar 237 millirdir krónur.

Bæði Halliburton og Baker Hughes hava virksemi í Noregi, har tær hava høvuðsskrivstovur í Tananger uttanfyri Stavanger.

Fyritøkurnar eru millum tær størstu veitingarfyritøkurnar á oljumarknaðinum. Baker Hughes hevur eitt mett marknaðarvirði uppá knappar 150 milliardir krónur, meðan Halliburton hevur umleið tað dupulta.